## Rehn stendur við sítt

ES-kommiserurin Olli Rehn, sum hevur ábyrgdina av samráðingunum við komandi limalond, heldur uppá, at Ísland kann fáa limaskap í ES skjótari enn onnur lond. Tað sigur hann við finska blaðið Helsinki Sanomat, eftir at formaðurin í Evropatinginum, Hans-Gert Pöttering, hevur sagt einum øðrum finskum blaði, at tíðin er ikki búgvin til at tosa um íslendskan limaskap nú, tí viðurskiftini viðvíkjandi Lissabon-sáttmálanum eru ikki komin upp á pláss. Olli Rehn heldur harafturímóti, at einki forðar ES at tosa við Ísland um limaskap.



## Nærkast stjórn í Zimbabwe

Tjóðartingið í Zimbabwe hevur einmælt samtykt nakrar broytingar í stjórnarskránni, sum hava við sær, at andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, kann vera forsætisráðharri. Tað skrivar BBC. Samtyktin merkir, at Tsvangirai og Robert Mugabe, forseti, skulu býta tað politiska valdið, sum Mugabe hevur havt tey seinastu 29 árini. Eygleiðarar vænta, at Mugabe fer at staðfesta samtyktina hjá tinginum í morgin, og at Tsvangirai kann taka við tann 11. februar. Semjan í Zimbabwe er komin í lag eftir trýst úr Suðurafrika og øðrum londum.

## Vaknaðu til myrkur

**Klokkan 6:53 fór streymurin í øllum megin-økinum. Klokkan 7:40 høvdu øll fingið streymin aftur. Orsøkin var, at motorarnir á Sundi slerdu frá**

STREYMSLIT
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tey flestu, sum ikki vóru so tíðliga uppi í morgun vaknaðu til myrkur. Enn er myrkt uttanfyri, og heldur ikki SEV megnaði at lýsa upp í morgun.

- Tað, sum hendi, var, at ein motorur á Sundi fekk ein trupulleika. Hetta hevur við sær, at hann steðgar. Meiningin er síðani at hinir báðir motorarnar skulu taka yvir. Hetta megnaðu teir ikki, og teir slerdu eisini frá. Tá vit missa tríggjar motorar klára vit ikki at veita streym, sigur Finn Jakobsen, tekniskur leiðari hjá SEV.

Hann vísir somuleiðis á, at enn er møguleiki fyri at klaki kemur á streymlinjurnar, tí veðrið háttar sær, sum tað ger.

- Tað er vandi fyri tí, men vit vóna tað besta. Klára vit til middags, so skuldi verið sloppið, sigur tekniski leiðarin.

Meiningin var, at streymurin til Dals, Skarvanes og Djúpadal skuldi sløkkjast, tí arbeiði skuldi gerast har í morgun, men vegna veður verður hetta ikki gjørt.



# Íslendingar takka føroyingum

**Íslendingar halda áfram at takka føroyingum og føroyska sendistovan fær javnan heilsur frá fólki, sum av sínum eintingum takka føroyingum fyri samkenslu og hjálp**

FRÆNDALAG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólk ringja av sínum eintingum inn til føroysku sendistovuna í Reykjavík, bert fyri at takka føroyingum fyri vísta samkenslu og tað vinarlag, føroyingar gjøgnum tíðina hava sýnt íslendingum. Sendistovan er dagliga í sambandi við íslendingar, og tey allarflestu ynskja at takka og vísa sína gleði og nøgdsemi um stuðulin úr Føroyum.

Tingmaðurin og føroyavinurin Karl V. Matthíasson úr Samfylkinginum var inni á gólvinum á Austurstræti 12 tann 20. oktober við blómum frá Útnorðurráðnum. Karl V. Matthíasson er formaður í íslendsku altingsnevndini í Útnorðurráðnum. Útnorðurráðið takkaði inniliga føroysku tjóðini fyri hollan stuðul.

Røktarin, Hannes Kristmundsson, ynskir saman við konu síni Sigurbjörg at geva føroyingum 200 jólastjørnur sum tøkk fyri lánið, føroyingar hava latið íslendingum. Hann fór sjálvur til Føroyar saman við vinmanni sínum Péturi Hafstein Lárusson, at bera út jólastjørnur til ellisheim, sambýli og sjúkrahús í Føroyum.

Íslendska skaldið Kristján Hreinsson hevur skrivað yrking til føroyingar, sum tøkk fyri lánið, og las hann hana upp í veitslu í føroyingafelagnum tann 1. november.

Íslendingur, sum í mong ár hevur framleitt náttúrufilmar frá íslendsku náttúruni, hevur valt at geva Kringvarpi Føroya og Føroya Skúlabókagrunni hesar filmar ókeypis.

Íslendski sangarin, Geir Ólafsson, hevur verið í sambandi við sendistovuna tí hann vildi geva eitt jólalag til føroyingar sum takk fyri lánið. Talan er um eitt kent jólalag, ið hann hevur fingið týtt til høvið og sum verður sent í ÙF.

### Sangur og fríplàss

Karlakór Reykjavíkur letur 40 ókeypis atgongumerki stóru jólakonsert teirra í Hallgrímskirkjuni til føroyingar, sum tøkk fyri lánið.

Karlakórinn Fjallabræður, ið er eitt rokkmannskór frá Vestfjørðunum, fer at hava konsert í Tjóðminnasavninum í Reykjavík sunndagin 30. november klokkan 16.00. Í hesum sambandi frumframføra teir eitt lag, ið teir hava skrivað serliga til føroyingar. Kórlimirnir eru vestanífrá, millum annað av Flateyri og Súðavík, og lagið er ein tøkk til føroyingar fyri hvussu góðir teir hava verið fyri íslendingar gjøgnum árini

Handil á Laugarvegnum letur serligan avsláttur til føroyingar og lýst verður við hesum við skelti í vindeyganum.

Privati lærdi háskúlin á Bifrøst letur tvey ókeypis pláss til føroysk lesandi komandi lestrarár, sum tøkk fyri lánið.

Eisini privati lærdi háskúlin í Reykjavík takkar føroyingum fyri tann stuðul, sum føroyingar altíð hava víst íslendingum, tá ið á stendur. Háskúlin í Reykjavík vil gera alt, sum stendur í hansara valdi til tess at styrkja sambandið landanna millum og metir hægri lesnað í Íslandi vera ein góðan møguleika hjá føroyingum



og tekur í hesum sambandi upp samráðingar við føroyska mentamálaráðið

### Teldupostar

Her er eitt dømi um ein teldupost, ið vit hava fingið frá einum íslendingi:

*"Ágætu Færeyingar.*
*Varla er hægt með orðum að lýsa flví flakklæti sem við almenningur á Ísandi berum í hjörtum okkar, til ykkar Færeyinga, fyrir flá óeigingirnu aðstoð sem flið hafið veitt okkur á flessum hremmingartímum.*
*Eins og fram kemur í eftirfarandi setningu sem höfð er eftir Davíð Oddsyni seðlabankastjóra:*
*"fiað hefur verið sagt, að sannir vinir séu fleir hóglátu englar sem lyfta undir mann flegar maður sjálfur hefur misst flugið. Færeyingar eru fless háttar englar, hafi fleir heila flökk og blessun,,.*
*Takk fyrir,*
*Guðbjartur G. Gissurarson*
*Fífuhvammi 31*
*200 Kópavogi*
*Ísland"*

Eisini hava íslendingar sett eina heimasíða á stovn. 25. november høvdu 25766 íslendingar takkað Føroyum fyri lánið.Slóðin er http://faroe.auglysing.is/

Handil hevur føroyskar dagar RV-handil lýsir við 'føroyskum degi', har bjóðað verður uppá "føroyskar" bollar, vafflur o.a.

Ein bólkur er stovnaður á Facebook har íslendingar kunnu gera seg til "frændir færeyinga". Bólkurin hevur í løtuni 6612 limir og av hesum eru 236 sum hava valt at skriva eina heilsan á veggin. Eisini eru 9262 íslendingar, í sambandi við lánið, blivnir "tilhangarar hjá føroyingum" á facebook.

Kelda: Íslendska sendistovan í Reykjavík

# Klintrimús fer eftir metinum

**Atgongumerki til seinastu sýningarnar av Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskógini, verða sett til sølu í dag. Tá seinasta sýningin er leikt, hevur Sjónleikarhúsið sýnt 67 sýningar, sum er met**

SJÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tað hevur verið gravgangur eftir atgongumerkjum til Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskógini líka síðan hol varð sett á sýningarnar í oktober mánaði. Útselt hevur verið til hvørja sýning fram til seinast í januar, atgongumerkini til eykasýningarnar vóru alt fyri eitt skrødd burtur, og í dag er seinasti møguleiki at ogna sær atgongumerki til eina av allarseinastu sýningunum.

- Vit hava higartil spælt 56 sýningar av leikinum. Vit seta 11 sýningar afturat á skánna, og verður tað útselt aftur, seta vit met. Gamla metið eigur familjuleikurin Fólk og dólgar í Kardamummubýi, sum í 2004 setti met við 63 sýningum, sigur húsavørðurin, Hjálmar Dam.

Millum 112-116 fólk hava verið til hvørja sýning. Higartil hava umleið 6500 fólk sæð Klintrimús. Sostatt fer tað at tátta í 8000 fólkum, ið hava sæð Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskógini, tá leikarnir takka fyri seg eftir seinastu sýning, sum verður 25. februar.

Hjálmar Dam sigur, at fólk til hvørja sýning møta upp við einum smíli. Leikararnir spæla sjálvbodnir, og noyðast at fara aftur til sítt arbeiði.

- Tað vísir seg, at tað er lokkandi fyri familjur at koma til slíkar leikir sum Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskógini. Men vit mugu steðga meðan leikurin er góður, sigur Hjálmar Dam.



*Higartil hava 6500 fólk sæð Klintrimús og hini dýrini í Valbakkaskógini. Eftir seinastu sýning hava væntandi 8000 fólk sæð leikin*
*Savnsmynd*